# Grønlandskópurin leggur nógv fyrr enn vanliga

**NÁTTÚRA** Vanliga leggur grønlandskópurin í februar ella mars, men longu fyri einum mánað síðani sóu menn nýlagdar nósar á ísinum við Labrador. Teir klára ikki veturin



Árni Joensen

Líka síðani fyrst í desember hava kanadiskir veiðimenn boðað frá, at teir hava sæð nýlagdar grønlandsnósar á mísinum úti fyri Rigolet, Makkovik og Hopedale í Labrador. Seinni frættist eisini, at veiðimenn høvdu sæð nýlagdar grønlandsnósar á ísinum við Labradorstrondina. Tað er sera óvanligt, tí vanliga leggur grønlandskópurin ikki fyrr enn í februar ella mars.

Simon Kohlmeister, sum er lívfrøðingur hjá myndugleikunum í Norðurkanada, sigur við sjónvarpið CBC News, at tað lýggja veðrið seinasta heyst kann vera ein orsøk til, at grønlandskópurin leggur fyrr í ár enn vanligt. Hann vísir á, at tað var so lýtt sum um várið nógvar dagar í Labrador í heyst.

Simon Kohlmeister sigur, at hann hevur tosað við eldri fólk í Norðurkanada, og at eingin teirra dugir at minnast, at kópurin hevur lagt so tíðliga fyrr. Samstundis er greitt, at nósi, sum verður lagdur so tíðliga, klárar ikki veturin, sigur hann.

## Lýkka ella dálking

Tann stóri spurningurin, sum vísindafólk og veiðimenn seta sær, er, hví grønlandskópurin leggur so nógv fyrr enn vanligt. Tað lýggja veðrið kann vera ein frágreiðing, men onnur spyrja, um tað kann vera dálkingin, sum ger tað. Uppaftur onnur vísa á, at djóraverndarfelagsskapirnir plaga at vera skjótir at gera vart við seg, tá menn veiða kóp, men at tað letur ikki í teimum, nú nósar í stórum tali doyggja uttan fyri veiðitíðina.

Kanadisk lóg bannar monnum at skjóta nýlagdan nósa, og teir, sum eru lagdir alt ov tíðliga, fara tí at vikna spakuliga, til teir at enda doyggja.



KOYRING

*Teir gomlu bussarnir (myndin) hava tænt fyri seg. Nú nýggj bussfyritøka fer at røkja koyringina í Tórshavnar Kommunu frá 1. apríl, verður tað gjørt við nýggjum bussum*

# Nýggju bussarnir koma í juni

**BUSSAR** Hóast nýtt felag fer at røkja Bussleiðina í Havn frá 1. apríl – og tað við nýggjum bussum, verður neyðugt at brúka teir gomlu bussarnar nakrar mánaðir eftir henda skeringsdag

Snorri Brend

Havn: Fyri sløkum mánaði síðani skrivaði Tórshavnar kommuna undir avtalu við Gundurs Bussar um at røkja busskoyringina í kommununi.

Henda avtalan fær gildi frá 1. apríl, men longu nú er greitt, at ein partur av avtaluni verður ikki útint sjálvan yvirtøkudagin: Ætlanin um teir nýggju bussarnar.

Tað tók sína tíð hjá kommununi at fáa øll viðurskiftini í rættlag, og tí dró tað út við at fáa øll loyvi og avtalur nóg tíðliga. Hetta førdi aftur við sær, at móttøkudagurin av teim nýggju bussunum verður seinni enn ætlað.

Skipanin verður soleiðis, at teir fyrstu 4-5 bussarnir koma higar til landið í apríl mánaði, og síðani koma hinir so við og við.

– Vit ætla tó, at allir bussarnir verða klárir at seta í koyring fyrst í juni mánaði, upplýsir Boði Haraldson, býarverkfrøðingur í Havn.

## 19 mió

Fram til skiftið 1. apríl fara tí bussar hjá MB Bussum at røkja koyringina eins og nú.

Eftir henda dag verða tað so fólk frá Gundurs Bussum, saman við tveimum undirveitarum, sum skulu gera tað við »gomlum« bussum eina tíð aftrat.

Eitt stig frá teimum í kommununi er tískil at fáa í lag eitt samskifti við verandi bussfelag um koyring og bussar fram til teir fyrstu dagarnar í juni mánaði.

– Neyðugt er við ávísari tillaging, og tað mugu vit so tosa saman um, vísir býarverkfrøðingurin á.

Sambært tí sum er komið fram, verður talan um 14 spildurnýggjar bussar sum koma at koyra í kommununi í summar.

Avtalan millum partarnar kostar kommununi 19 mió krónur í ár.